Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 24.09.2026 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Magnus Skoralíð<br>Hanna Jensen<br>Ann Fuglø<br>Heri Mikálsson<br>Pól í Skorini<br>Unn Jarnskor Ellingsgaard<br>Tórur Didrik Djurhuus<br>Uni Rasmussen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |

| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 48/26 | 25/00170-3 | Umsókn um at leingja leigusáttmála - matr. nr. 198c í Norðragøtu (Grótbrotið) | 2 |
| 49/26 | 26/00249-3 | Marknaumskipan av parti av matr. nr 193b at leggja aftrat matr. nr. 193h í Norðragøtu | 4 |
| 50/26 | 26/00349-3 | Umsókn um keypa av ískoytisstykki - Stallagøta 19 (matr. nr. 142e) í Norðragøtu | 7 |
| 51/26 | 26/00401-1 | Keyp av byggilendi - Fløtugerði og Nýggjagerði í Leirvík | 9 |
| 52/26 | 26/00402-1 | Útboð av matr. nr. 339ap í Leirvík | 12 |
| 53/26 | 26/00420-1 | Fíggjarætlan 2027 | 14 |

Til viðgerð:

## <u>48/26 Umsókn um at leingja leigusáttmála - matr. nr. 198c í Norðragøtu (Grótbrotið)</u>

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 17.06.2025 | 3/25 | 25/00170-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 17.06.2025 | 27/25 | 25/00170-3 |
| 3 Býráðið | 24.09.2026 | 48/26 | 25/00170-3 |
| 4 Vinnunevndin | 15.09.2026 | 5/26 | 25/00170-3 |
| 5 Fíggjarnevnd | 21.09.2026 | 34/26 | 25/00170-3 |
| 6 Býráðið | | | 25/00170-3 |

**Málslýsing:**

Leigusáttmálin viðv. matr. nr. 198c í Norðragøtu fekk út 1. apríl 2025, og leigarin hevur søkt um at leingja sáttmálan við 25 ár.

Uppskot til nýggjan sáttmála er gjørdur.

Viðfest er verandi og nýggjur sáttmáli.

**Ískoyti 16.09.2026**
Leigusáttmálin viðv. matr. nr. 198c í Norðragøtu fekk út 1. apríl 2025, og eigur hesin sáttmálin at verða endurnýggjaður.

Uppskot um nýggjan sáttmála er gjørdur og viðfestur.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at samtykkja sáttmálan.

**Ískoyti 16.09.2026**
Umsitingin mælir til at gera nýggja sáttmála.

**Vinnunevndin 17. juni 2025**
Vinnunevndin tekur undir tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 17. juni 2025**
Einmælt samtytkt at umsitingin kannar málið nærri áðrenn støða verður tikin í málinum.

**Vinnunevndin 15. september 2026**
Vinnunevndin tekur undir tilmælinum hjá umsitingini, treyta av at sáttmálin verður longdur við 5 árum.

**Fíggjarnevnd 21. september 2026**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

**Býráðið 24. september 2026**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini..

## 49/26 Marknaumskipan av parti av matr. nr 193b at leggja aftrat matr. nr. 193h í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 16.09.2026 | 26/26 | 26/00249-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | | | 26/00249-3 |
| 3 Býráðið | 24.09.2026 | 49/26 | 26/00249-3 |
| 4 Vinnunevndin | 15.09.2026 | 6/26 | 26/00249-3 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur tann 6. mai 2026 móttikið umsókn um keyp av einum parti av matr. nr. 193b í Norðragøtu.

**Lýsing av málinum**
Umsóknin fevnir um keyp av einum parti av matr. nr. 193b, sum ætlanin er at leggja afturat matr. nr. 193h í Norðragøtu.

Talan er um eitt øki, sum liggur út móti vegnum við vinnuøkið í Norðragøtu. Umsøkjarin ynskir at keypa umleið 671 m² av økinum.

Endamálið við keypinum er at víðka um matrikulin og nýta økið til smærri vinnubygningar. Ætlanin er, at bygningarnir skulu hava somu nýtslu sum smærri vinnubygningar, ið longu eru uppførdir á matr. nr. 193d.

Sambært **Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn** skulu kommunalar ognir, sum eru størri enn 300 m², sum meginregla seljast við almennum útboði.

Í hesum føri er talan tó um eitt serstakt øki, sum liggur út móti vegnum, og sum er staðsett 5 metrar frá vegkantinum. Økið hevur sostatt eina støðu og avmarking, sum ger, at tað ikki verður mett at vera eitt øki, sum kommunan annars hevði boðið út til almenna sølu.

Við støði í hesum verður mett, at grundarlag er fyri at veita frávik frá kravinum um alment útboð og selja økið beinleiðis til eigaran av matr. nr. 193h, treytað av, at aðrar neyðugar myndugleikakrøv og treytir verða hildnar.

Økið er fevnt av **C2 – vinnu- og miðstaðarbygging** sambært serstøku byggisamtyktini fyri økið.
Ætlaða nýtslan av økinum til smærri vinnubygningar er sostatt í samsvari við ásetingarnar í byggisamtyktini, treytað av at ein møgulig byggiætlan lýkur galdandi krøv í byggilóggávuni og byggisamtyktini.

**Lógir o.a.:**

- **Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.**

  **§ 2.** Fastogn nýtist tó ikki at verða boðin alment út, um talan er um
  1. sølu til landsmyndugleikar, kommunu ella kommunalan felagsskap, sbr. § 57 í kommunustýrislógini,
  2. sølu til felag, stovn v.m., sum kommunan lógliga kann veita stuðul,
  3. sølu av økjum, ið eru minni enn 300 m² til víddar og sum tað ikki sjálvstøðugt k á ella
  4. kommunala útstykkingar o.l., har tillutan og prísáseting fara fram eftir framman reglum.

  *Stk. 2.* Við góðkenning frá landsstýrismanninum kann verða vikið frá kravinum um sambandi við makaskifti og tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastogn seld uttan alment útboð.

- **Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.**

  **§ 20.** Øll sundurbýtismál skulu sendast viðkomandi kommunustýri til ummælis. K skal greiniliga skila til, um nøkur regla í § 17 er til hindurs fyri sundurbýtinum.

**§ 17.** [1)] Við sundurbýti má lutur ikki verða lagdur í sovorðnum skapi, at hann er óhentur t endamálið. Harundir má partur í felagseigindómi uttangarðs altíð hoyra til ávísan fastan eig somu markatalsbygd.

*Stk. 2.* [1)] Verður tað í kommunustýrisins ummæli eftir § 20 ella á annan hátt upplýst, at tað sundurbýtinum koma fram viðurskifti, sum ikki samsvara reglunum í:

a) lóggávuni um byggi- og brunaviðurskifti,

b) eini góðkendari byggisamtykt ella býarskipan, ella

c) lóggávuni annars, kann sundurbýtið ikki verða góðkent uttan so, at avvarðandi myndug hevur givið undantaksloyvi.

**Skjøl í málinum**

- Marknaumskipan av matr. nr. 193h.

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 20.000,- kr. |

| **Tilmæli** |
|---|

Tekniska umsitingin mælir til, at kommunan góðkennir søluna av umleið 671 m² av matr. nr. 193b í Norðragøtu til eigaran av matr. nr. 193h, at leggja afturat matr. nr. 193h.

Mælt verður samstundis til, at heimild verður givin til at selja økið uttan alment útboð, við støði í serstøku umstøðunum í málinum, herundir at økið liggur út móti vegi og er staðsett 5 metrar frá vegkantinum, og tí ikki verður mett at vera eitt sjálvstøðugt byggiligt øki, sum annars hevði verið boðið út til almenna sølu.

Sølan er treytað av, at neyðug marknaumskipan verður framd, og at økið verður selt í samsvari við galdandi lógar- og myndugleikakrøv.

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 16. september 2026</u>**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Vinnunevndin 15. september 2026</u>**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Býráðið 24. september 2026</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 50/26 Umsókn um keypa av ískoytisstykki - Stallagøta 19 (matr. nr. 142e) í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 16.09.2026 | 27/26 | 26/00349-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 21.09.2026 | 35/26 | 26/00349-3 |
| 3 Býráðið | 24.09.2026 | 50/26 | 26/00349-3 |

**Málslýsing:**

**Uppruni til málið:**
Eysturkommuna hevur tann 3. august 2026 móttikið umsókn um at keypa eitt ískoytisstykki av matr. nr. h í Norðragøtu, við tí endamáli at leggja økið aftrat matr. nr. 142e í Norðragøtu.

**Lýsing av málinum:**
Økið, sum umsóknin fevnir um, er ein geiri, sum liggur millum matr. nr. 142e og matr. nr. 32b í Norðragøtu.

Slíkir geirar verða vanliga varðveittir sum almenn øki til møguligar framtíðar gøtur millum útstykkingar. Endamálið er m.a. at tryggja møguleikan fyri at knýta framtíðar útstykkingar ella aðrar byggiætlanir saman við verandi vegakervi og gøtuneti.

Ein søla av hesum øki kann tí avmarka møguleikan hjá kommununi at nýta økið til framtíðar gøtur, eitt nú í sambandi við eina møguliga nýggja útstykking í økinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongar

**Tilmæli**

Umsitingin mælir frá, at selja part av matr. nr. h at leggja aftrat matr. nr. 142e í Norðragøtu.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 16. september 2026**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 21. september 2026**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

Per Martin Gregersen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.

**<u>Býráðið 24. september 2026</u>**
Einmælt samtykt at taka undir vi tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

Per Martin Gregersen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.

## 51/26 Keyp av byggilendi - Fløtugerði og Nýggjagerði í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 16.09.2026 | 28/26 | 26/00401-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 21.09.2026 | 36/26 | 26/00401-1 |
| 3 Býráðið | 24.09.2026 | 51/26 | 26/00401-1 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna arbeiðir støðugt við at tryggja kommununi nøktandi byggilendi, soleiðis at tøk grundstykki eru til taks í kommununi.

Við tí í huga er neyðugt, at kommunan fer undir at ogna sær jørð í Leirvík við atliti at komandi útstykkingum og tørvinum á fleiri grundstykkjum.

Eysturkommuna fekk tann 30. september 2008 útarbeidda eina útstykkingarætlan fyri Leirvík. Ætlanin er framvegis eitt grundarlag í sambandi við møguliga útvegan av lendi til komandi útstykkingar.

Í løtuni eru bert tvey grundstykki tøk til sølu og bygging í Leirvík. Tørvur er tí á at tryggja kommununi fleiri grundstykki, soleiðis at kommunan framhaldandi kann bjóða byggilendi fram til borgarar og møguligar tilflytarar.

Vísandi til galdandi byggisamtykt og býarplan fyri Leirvík er ætlanin at ogna kommununi jørð í økjunum Fløtugerði og Nýggjagerði við atliti at komandi útstykkingum.

Fløtugerði
Talan er um matr. nr. 166a, 195a og 194a.
Økið er landsjørð og er uml. 15.351 fermetrar til støddar í alt.

Nýggjagerði
Talan er um matr. nr. 195a, 128a, 194a, 13a, 388 og 166a.
Talan er bæði um landsjørð og privata jørð. Á einum av stykkjunum stendur eitt seyðahús.
Økið er uml. 15.974 fermetur til støddar í alt.

Sambært upplýsingum frá Umhvørvisstovuni (us.fo) er jørðin í Leirvík flokkað sum økisbólkur 3.
Upplýstu prísirnir fyri jørð eru:
- Lendi: 89,00 kr./fermetur
- Hagalendi/ódyrkað lendi: 0,70 kr./fermetur
- Dyrkað lendi: 4,80 kr./fermetur

Harafturat skal havast í huga, at talan er um keyp av bæði landsjørð og privatari jørð. Í sambandi við keyp av privatari jørð hevur Eysturkommuna áður goldið umleið 110,00 kr./fermetur.

Endaligi kostnaðurin fyri lendið kann tí ikki staðfestast, fyrr enn støða er tikin til, hvør partur av jørðini verður keyptur, hvussu jørðin er flokkað, og hvørjir keypsprísir verða avtalaðir við eigararnar.

Umsitingin metir, at tað er neyðugt at tryggja Eysturkommunu meira byggilendi í Leirvík, soleiðis at kommunan kann arbeiða langsiktað við komandi útstykkingum og tryggja, at nøktandi nøgd av grundstykkjum er tøk.

Keyp av jørð í Fløtugerði og Nýggjagerði samsvarar við galdandi byggisamtykt, býarplanin fyri Leirvík og ta útstykkingarætlan, sum varð gjørd í 2008.

Ein ognan av hesum økjum vil geva kommununi betri møguleikar at fyrireika og fremja komandi útstykkingar, samstundis sum kommunan tryggjar sær ræðið á neyðugum lendi til framtíðar byggilendi.

**Sí skjøl í málinum.**

- Byggisamtykt fyri Eysturkommunu – Leirvík
- (99)_300 útstykkingarætlan
- Keyp av jørð í Leirvík

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Umleið 4.500.000 kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at Eysturkommuna arbeiðir víðari við at kanna møguleikarnar fyri at keypa jørð í Fløtugerði og Nýggjagerði í Leirvík við tí endamáli at tryggja kommununi byggilendi til komandi útstykkingar.<br><br>Mælt verður samstundis til, at umsitingin fær heimild til at taka upp samráðingar við viðkomandi jarðareigarar og myndugleikar um møguligt keyp og at leggja eitt ítøkiligt uppskot um keyp, keypsprís og fígging fyri politiska støðutakan, tá neyðugir upplýsingar fyriliggja. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 16. september 2026**

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 21. september 2026**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tlmælinum hjá byggi- og býarskipananevndini.

**Býráðið 24. september 2026**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 52/26 Útboð av matr. nr. 339ap í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 16.09.2026 | 29/26 | 26/00402-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 21.09.2026 | 37/26 | 26/00402-1 |
| 3 Býráðið | 24.09.2026 | 52/26 | 26/00402-1 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur fingið fyrispurningar frá fleiri feløgum um møguleikan at byggja íbúðir á matr. nr. 339ap í Leirvík.

**Lýsing av málinum**

Býráðið samtykti tann 24. februar 2022 at bjóða matr. nr. 339ap í Leirvík út til íbúðarbygging.

Økið varð síðani boðið út, og tann 26. januar 2023 samtykti býráðið at gera sáttmála við vinnandi arbeiðstakaran. Avtalan varð tó ikki framd, og íbúðarbyggingin varð ongantíð sett í verk. Økið kom tí aftur til Eysturkommunu.

Í sambandi við útboðið hevði Eysturkommuna fingið Advokatfelagið Sókn at gera útbjóðingartilfar. Ætlanin var at bjóða økið út sum eina heildarætlan, har tann bjóðandi skal standa fyri at gera verkætlan, lata inn tilboð og leggja fram tíðarætlan fyri bygginguna.

Ein dómsnevnd var sett at meta um innkomnu uppskotini út frá teimum treytum, sum verða ásettar í útbjóðingartilfarinum. Dómsnevndin gjørdi síðan tilmæli um vinnandi uppskotið.

Fleiri feløg hava síðani víst áhuga fyri at byggja íbúðir á økinum.

Matr. nr. 339ap er umleið 1.200 fermetrar til støddar, og mett verður, at møguleiki er fyri at skipa økið til umleið 8–10 íbúðir, treytað av endaligari projektering og myndugleikagóðkenning.

**Lógir o.a.**

- **Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.**

§ **2.** Fastogn nýtist tó ikki at verða boðin alment út, um talan er um

1. sølu til landsmyndugleikar, kommunu ella kommunalan felagsskap, sbr. § 57 í kommunustýrislógini,
2. sølu til felag, stovn v.m., sum kommunan lógliga kann veita stuðul,
3. sølu av økjum, ið eru minni enn 300 m² til víddar og sum tað ikki sjálvstøðugt kann v á ella
4. kommunala útstykkingar o.l., har tillutan og prísáseting fara fram eftir frammanundar reglum.

*Stk. 2.* Við góðkenning frá landsstýrismanninum kann verða vikið frá kravinum um alme sambandi við makaskifti og tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastognin ka seld uttan alment útboð.

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 50.000,- kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at Eysturkommuna bjóðar matr. nr. 339ap í Leirvík út til íbúðarbygging sum eina heildarætlan, og at ein dómsnevnd verður sett at meta um innkomnu uppskotini og gera tilmæli til býráðið. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 16. september 2026**

Byggi- og býarskipanin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 21. september 2026**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 24. september 2026**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 53/26 Fíggjarætlan 2027

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 21.09.2026 | 38/26 | 26/00420-1 |
| 2 Býráðið | 24.09.2026 | 53/26 | 26/00420-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst veður til fyriliggjandi uppskot frá fíggjarnevndini. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at málið verður beint í føstu nevndinrnar til víðari viðgerð |

**Fíggjarnevnd 21. september 2026**
Fíggjarnevdin mælir til at málið verður beint í føstu nevndirnar til víðari viðgerð.

**Býráðið 24. september 2026**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

fundurin lokin 19.00

Per Martin Gregersen

Magnus Skoralíð

Hanna Jensen

Ann Fuglø

Heri Mikálsson

Pól í Skorini

Unn Jarnskor
Ellingsgaard

Tórur Didrik Djurhuus

Uni Rasmussen